## Amway í Føroyum

AMWAY
*tíðindaskriv*

17. januar í ár komu føroyingar við í Amway samstarvið. Umboð í Føroyum er Oda Fuglø sum er vælkend her heima. Komandi vikuna fer hon saman við umboðum í Danmark at ferðast runt og vísa vørurnar fram. Eitt vøruútboð sum umfatar alt frá persónligari pleygu, kosttilskoti, reingerð til heim og virkir, eins og reingerð av klæðum.

Søgan um Amway byrjaði í 1959 av tveimum ungum framfýsnum arbeiðstakarum í USA, Rich DeVos og Jay Van Andel. Ætlanin hjá teimum var við nýhugsan at skapa handilsmøguleikar sum vórðu bygdir á handil frá persóni til persón.

Í dag er hetta ein skjóttvaksandi fyritøka sum er í 96 londum, við meiri enn trimum mió sjálvstøðugum seljarum, sum verður kallað IBO (stendur fyri Independent Business Owners)

Eisini hevur fyritøkan ígjøgnum árini vunnið fleiri heiðurmerki fyri sítt stóra arbeiði at framleiða umhvørvisvinarligar vørur. T.d. vunnu tey í 1989 umhvørvisvirðislønina hjá ST. Dentur verður lagdur á, at alt sum fer út í náttúruna verður biologiskt niðurbrotið. Við øðrum orðum reinsar náttúran seg sjálva við leivdum frá Amway vørunum, eins og innihaldi av vitaminum og mineralum í vøruni verður givið víðari til náttúruna.

Av samstarvsfeløgum hjá Amway kunnu nevnast NASA, Discovery Channel og Unicef Børnefonden.

# Fámjiningar vísa ikki landsstýrinum frá sær

**Eisini bygdaráðið í Fámjin er áhugað í ætlanini hjá landsstýrinum at byggja ein skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági men tað kann ikki taka støðu, sum málið liggur nú**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*



*Fámjins Bygdaráð er sinnað at tosa við landsstýrið um ætlanina at byggja skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági, men tað vil hava meiri at vita um ætlanina, áðrenn endalig støða kann takast. Frá vinstru sita Niels Jákup Trygvason Nielsen, Sóley Joensen, Tórhallur Mortensen og Arni Nielsen. Innsett er mynd av Elin Nielsen, borgarstjóra*

Nú hevur eisini bygdaráðið í Fámjin viðgjørt ætlanina hjá landsstýrinum um at byggja ætlaða heilsuskúlan og miðnámsskúlan í Suðuroy í ein skúladepil í Hovi og at byggja røktarheim í Vági ístaðin.

Og eins og hinar kommunurnar í Suðuroy, halda eisini fámjiningar, at teir vita alt ov lítið um ætlanina til at bygdaráðið kann hava eina støðu til málið.

Men bygdaráðið vísir kortini ikki málið frá sær.

Á bygdaráðsfundi hósvøldið viðgjørdi bygdaráðið ætlanina og og har varð samtykt, at bygdaráðið fer fegið á fund við landsstýrið at fáa fleiri upplýsingar.

Og fyrrenn tann fundurin hevur verið, kann bygdaráðið ikki taka støðu.

Annars hildu bygdaráðslimir í Fámjin, at avgerðin um skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági fer neyvan at standa ella fella við, hvørja støðu fámjiningar hava til spurningin.

Tí sóknaðust fámjiningar fyrst og fremst eftir, hvørja støðu tær báðar stóru kommunurnar, Vágur og Tvøroyri, hava til málið.

# Nú bíða øll eftir vágbingum

**Nú er tað bara Vágs Býráð, sum ikki hevur viðgjørt ætlanina at byggja ein skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági. Allar hinar seks kommunurnar í Suðuroy eru sinnaðar at tosa við landsstýrið um ætlanina**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú bíða øll eftir, hvat vágbingar siga.

Men tað fáa vit at vita í næstu viku, tí tá fer Vágs Býráð at viðgera ætlanina hjá landsstýrinum um at byggja skúladepil í Hovi og at byggja røktarheim í Vági.

Upprunaliga hevur ætlanin verið at byggja miðnámsskúla í Vági og heilsuskúla á Tvøroyri. Men fyri at gera bæði bygging og rakstur bíligari, hevur landsstýrið heldur skotið upp at byggja ein skúladepil í Hovi við bæði miðnámsskúla og heilsuskúla.

Fyri at grundstykkið, sum er grivið út fyri miðnámsskúlanum í Vági, ikki skal fara fyri skeyti, skjýtur landsstýrið upp at byggja røktarheim á tí ístaðin fyri. Ein slík ætlan vildi bæði skapt nógv arbeiðið í byggivinnnuni í Suðuroy eins og tað kundi skapt varandi, almenn arbeiðspláss í Vági, heldur landsstýrið.

Samstundis kundi tað bøtt munandi upp á stóra tørvin á røktarheimsplássum í Suðuroy,

Landsstýrið hevur biðið kommunurnar svara í hesum mánaðinum um tær taka undir við tankanum í ætlanini, so at landsstýrið kann vita um hetta er nakað at arbeiða víðari við.

Taka kommunurnar undir við tankanum í ætlanini, er landsstýrið sinnað at fara suður í næsta mánaði at greiða nærri frá ætlanini, áðrenn endalig støða verður tikin.

### Seks av sjey hava svarað

Nú hava so seks av teimum sjey kommununum í Suðuroy viðgjørt ætlanina og hava, ella fara, at svara landsstýrinum.

Tær eru Fámjins-, Tvøroyrar-, Fámjins-, Hovs-, Porkeris- og Sumbiar kommuna.

Og fyribils bendir alt á, at hetta er nakað, sum landsstýrið kann arbeiða víðari við, tí allar tær seks kommunurnar eru sinnaðar viðgera ætlanina nærri saman við landsstýrinum.

Men tær eru eisini allar samdar um, at tær mugu fáa nógv meiri at vita frá landsstýrinum um ætlanina, áðrenn tær kunnu taka endaliga støðu.

Tí bíða tær allar eftir at landsstýrið skal koma suður í næsta mánaði at greiða nærri frá ætlanini.

Nú verður so bara bíðað eftir at vita, hvørja støðu, vágbingar hava.

Undanfarna býráðið hevði eina ógvuliga avgjørda støðu og tað var, at miðnámsskúlin skuldi undir ongum umstøðum flytast úr Vági.

Spurningurin er so um tað nývalda býráðið hevur eina bleytari støðu til málið.

Men tað fáa altso at vita í næstu viku, tá ið nývalda býráðið í Vági fer at viðgerða málið.

# Vita snøgt sagt onki

**Skal heilsuskúlin á Tvøroyri flytast í ein skúladepil í Hovi, vil Tvøroyrar Býráð hava endurgjald fyri tær milliónirnar, sum kommunan hevur brúkt upp á skúlan**

SKÚLADEPIL OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit lata hurðina standa opna. Men vit vita snøgt sagt onki.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur at enn veit Tvøroyrar Býráð alt ov lítið um ætlanina hjá landsstýrinum at byggja ein skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági.

Býráðið hevði innanhýsisfund um málið hósdagin.

Á fundinum samtykti býráðið, at ongin endalig støða verður tikin til málið, fyrenn býráðið hevur fingið nógv meiri at vita um ætlanina.

– Vit vita rætt og slætt onki um ætlanina og tí kunnu vit heldur ikki taka støðu, sigur Kristin Michelsen.

Hetta merkir so eisini, at Tvøroyrar Býráð letur ikki hurðina aftur, men er sinnað at viðgerða málið nærri.

– Tí eru vit sinnað at fara á fund við landsstýrið um málið, sigur Kristin Michelsen.

### Vilja hava endurgjald

Men hetta merkir eisini, at tað verður ikki treytaleyst, at Tvøroyrar Býráð góðtekur at heilsuskúlin verður fluttur av Tvøroyri.

– Tað er ikki Tvøroyrar Býráð, sum hevur lagt skúlan á Tvøroyri. Samstundis hava skiftandi landsstýrismenn í skúlamálum vissað býráðið um, at skúlin skal verða verandi á Tvøroyri.

Og nú hann er komin á Tvøroyri, hevur býráðið raðfest hann sera høgt.

Av tí sama hevur Tvøroyrar Býráð brúkt milliónaupphædd upp á at kjølfesta skúlan á Tvøroyri.

Sostatt hava vit eina stóra millumrokning við landsstýrið, sum skal avgreiðast, um so er, at skúlin verður fluttur av Tvøroyri

Verður skúlin fluttur til Hovs, fer Tvøroyrar Býráð sostatt at krevja endurgjald frá býráðnum fyri tann pening, kommunan hevur offra uppá skúlan.

Á fundinum við landsstýrið, vil kommunan hava greiði á, hvussu verður við hesari millumrokningini.

Samstundis vil kommunan hava greiði á eldraøkinum, tí sum støðan er nú, er eldraøkið ein landsuppgáva burturav, sigur borgarstjórin.

Kommunan vil eisini hava at vita, hvat hesin heilsuskúlin umfatar og, hvørjar útbúgvingar skulu vera á skúlanum.

Hinvegin hevur Tvøroyrar Kommuna als onga støðu til, um tað heldur, at miðnámsskúlin og heilsuskúlin liggja betri fyri í Hovi enn ávikavist í Vági og á Tvøroyri.

### Áttu at tosa saman

Eisini heldur Tvøroyrar Býráð, at tað hevði verið hóskandi, at allar kommunurnar í Suðuroy tosaðu saman um ætlanina, so at tær kundu tikið eina felags støðu.

Sostatt fer Tvøroyrar Býráð eisini at biðja Vágs Býráð um fund um málið, áðrenn Vágs Býráð tekur støðu.

Av tí sama fýlist borgarstjórin á Tvøroyri eisini á, at tær smærru kommunurnar í oynni í prinsippinum hava tikið undir við ætlanini hjá landsstýrinum, uttan at tosa við hinar kommunurnar.

Eitt nú vísir hann á, at Hvalbiar- og Fámjins Kommuna hava nógv samstarv við Tvøroyri, men kortini viðgera tær spurningin um at flyta heilsuskúlan av Tvøroyri, yvir høvdinum á Tvøroyrar Býráði.

Tað sama ger seg galdandi í syðru helvt, har kommunurnar, sum hava samstarv við Vág, viðgerða eina ætlan um at flyta miðnámsskúlan úr Vági, uttan at tosa við Vág, uttan at tosa við Vágs Býráð.

Tað tekur borgarstjórin á Tvøroyri sum eina beinleiðis uppílegging í innanhýsis viðurskifti í Tvøroyrar og í Vágs Kommunu og tað heldur hann ikki er fremjandi fyri kommunusamstarvið í Suðuroynni.

– Tað er óheppið, at kommunurnar viðgera málið hvør sær ístaðin fyri at koma við einum felags útspæli til landsstýrið. Tað mest avgerðandi er, at kommunurnar finna eitt felags stev í hesum máli, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.